LØGTINGIÐ

Bjarni Djurholm
Millum Gilja 121
188 Hoyvík

Landsstýrismálanevndin

**3. juli 2008**
**j. nr. 7.13-20080010[3] ks/td**
(at tilskila í svari)

**Viðvíkjandi játtanini til Landssjúkrahúsið á fíggjarlógini fyri 2008**

Við skrivi, dagfest 3. juni 2008, hava tygum biðið Landsstýrismálanevndina um at svara nøkrum spurningum viðvíkjandi játtanini til Landssjúkrahúsið á fíggjarlógini fyri 2008. Spurningarnir eru hesir:

1. Vísandi til stýrisskipanina § 43, 2. stk er tað heimilað landsstýrinum at loyva Lsh at nýta pening, sum ikki er í samsvari við játtanina á fíggjarlógini fyri 2008?
2. Vísandi til stýrisskipanina § 43, 2. stk er ein politiskt ætlað kanning av sjúkrahúsverkinum nóg dygt grundarlag fyri at heimila Lsh at nýta meira pening enn játtanin á fíggjarlógini heimilar?
3. Um Lsh ikki fær boð um at spara, eigur løgtingið, vísandi til stýrisskipanina § 43, 2.stk. ikki beinanvegin koma saman at játta neyðuga rakstrarupphæddina til Lsh, so Lsh kann virka normalt, meðan sjúkrahúsverkið verður kannað næstu mánaðirnar?

Skrivið frá tygum varð viðgørt á fundi í landsstýrismálanevndini í dag, har nevndin gjørdi av, at senda tygum soljóðandi svarskriv:

Viðvíkjandi 1. spurningi kann verða upplýst, at landsstýrið ikki hevur heimild at loyva Landssjúkrahúsinum at nýta pening, sum ikki er í samsvari við játtanina á fíggjarlógini fyri 2008.

Viðvíkjandi 2. spurningi kann verða upplýst, at ein politiskt ætlað kanning av sjúkrahúsverkinum ikki er nóg dygt grundarlag fyri at heimila Landssjúkrahúsinum at nýta meira pening, enn játtanin á fíggjarlógini heimilar.

Viðvíkjandi 3. spurningi leggur Landsstýrismálanevndin til grund, at landsstýrismaðurin tekur øll neyðug stig fyri at tryggja, at játtanin á fíggjarlógini verður hildin. Um landsstýrismaðurin røkir sínar skyldir í hesum sambandi, ber illa til at meta um, fyrrenn fíggjarárið er farið.

Starvsskipanin fyri landsstýrismálanevndina ásetir í § 5, stk. 1, nr. 1, at nevndin tekur ikki mál til viðgerðar, tá ið nevndin ikki metir, at rímilig grund er á fyriliggjandi grundarlagi at halda, at brot er framt á lóggávuna. Við tilvísing til hesa áseting, gjørdi nevndin av ikki at gera meira við málið.

N.v

Heidi Petersen
nevndarformaður



TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901